## Ikki dýrt allastaðni



Tað er ikki allastaðni í heiminum, at olju- og bensinprísurin er methøgur. Heimsins lægsta bensinprís finnur tú í Venesuela, har liturin ikki kostar meiri enn 24 oyru. Heldur dýrari er tað at tanka upp í Turkmenistan, har liturin kostar 38 oyru. Í heimsins størsta oljulandi, Saudi Arabien, mugu bilførararnir av við 57 oyru fyri liturin, ein prísur, sum svarar til framleiðslukostnaðin. Nógv lond hava ein bensinprís sum er undir heimsmarknaðarprísinum upp á 3,95 krónur. Frágreiðingin er antin, sum í Saudi Arabien og Venesuela, at íbúgvarnir skulu njóta gott av náttúrutilfeinginum, ella eitt ynski um at tryggja íbúgvunum bíligt brennievni og halda inflatiónini niðri.

# Brúgv er loysnin í Leirvík

**- Sum borgari havi eg hug at krevja eitt vælgrundað svar upp á, hví ein loysn, sum at síggja til bæði er praktiskari, tryggari - og í longdini eisini bíligari - ikki verður tikin upp á tungu í sambandi við vegaføringina í Leirvík, sigur Rúna Sivertsen, fyrrverandi formaður í Ráðnum fyri Ferðslutrygd**

VEGAFØRING

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í viðmerking í bløðunum hevur Rúna Sivertsen, fyrrverandi formaður í Ráðnum fyri Ferðsutrygd, lagt seg út í kjakið um vegaføringina í Leirvík í sambandi við Norðoyatunnilin.

Í stuttum mælir hon Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinnu í samferðslumálum, til at gera eina brúgv úr grótkastinum á syðra enda á havnalagnum í Leirvík og norður á grótkastið við ferjuleguna.

Rúna vísir á, at politikarar í fleiri ár hava klandrast um, hvar vegurin úr Norðoyatunlinum skal liggja, men framvegis røkist lítið fyri semju.

- Tað undrar meg, at lítið og einki hevur verið at hoyrt um eina møguliga brúgvaloysn í hesum sambandi. Ein brúgv hevði helst bæði verið ferðslutryggari, praktiskari og bíligari, heldur fyrrverandi formaðurin í RFF.



*Mynd av skitsu við brúgv millum grótkastini í Leirvík, sum Dávur Winther hevur gjørt. Ein brúgv hevði ikki lutað bygdina sundur, sum ein vegur kann gera, og skipini kundu siglt inn og út sum áður*

### Eingin meinbogi

Í viðmerkingini sigur Rúna, at ein brúgv eisini hevði stytt um farleiðina, samstundis sum hon hevði sloppið leirvíkingum undan einum landsvegi, sum vísir seg at vera til forargilsi hjá bygdarfólkinum – líka mikið, hvar vegurin verður lagdur.

- Um rætt verður atborið, nýtist ein brúgvaloysn ikki at verða nakar stórur meinbogi fyri leirvíkingar, heldur fyrrverandi formaðurin í Ráðnum fyri Ferðslutrygd.

Tað undrar Rúnu, at eingin hevur tikið eina møguliga brúgvaloysn í Leirvík í álvara.

- Sum borgari havi eg hug at krevja eitt vælgrundað svar upp á, hví ein brúgvaloysn ikki verður tikin upp á tungu.

Hon vísir á, at Landsverk roynir at leggja allar vegir so niðarlaga sum gjørligt, tí jú ovari ein vegur liggur, verri er hann á vetri við kava og hálku.

### 18 metrar høg

- Ein brúgv verður einar 350 metrar long. Hon er stutt, trygg og heilt uttanfyri allan annan veg. Hetta merkir, at tú sparir viðlíkahald, frákoyringar og annað, sum má gerast í samband við ein veg – antin hann liggur ovari ella niðari í bygdini, sigur Rúna Sivertsen.

Sambært uppskotinum, sum Dávur Winther í sínari tíð spældi sær við á telduni, er brúgvin einar 18 metrar høg, og soleiðis er hædd eisini tikin fyri, at skip kunnu sigla inn og út av Leirvík.

Í uppskotinum hjá Dáva Winther verður brúgvin borin av trimum súlum.



*Á hesum vegastrekki hava fleiri ferðsluóhapp verið, har bilar, sum koma eftir vegnum úr Norðoyatunlinum, koyra beint út á landsvegin út á Vík*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Toskur er gull verdur í fiskiveiði og framleiðslu*

# Toskaprísurin heldur sær væl

**Prísurin á norskum alitoski er hægri enn prísurin á villum toski**

NOREG

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í síðstu viku fingu norskir útflytarar í miðal 64 norskar krónur fyri kilo av frystum toskaflaki. Tað er ein króna meira enn fyri einum ári síðan, og stívliga 4 krónur meira enn miðalprísurin fyri árið í ár.

Prísurin á feskum toski var í síðstu viku 30,10 krónur fyri kilo, og miðalprísurin fyri árið í ár hevur verið 31,30 norskar krónur.

Miðalprísurin á feskum toski í Noregi higartil í ár liggur tískil á sama støði sum í fyrra hálvári í fjør.

Prísurin á alitoski var 37,71 norskar krónur í miðal fyri kilo í síðstu viku, og tað er sama príslega sum um somu tíð í fjør.

Prísirnir, sum talan er um, eru teir, sum norskir útflytarar hava fingið fyri fisk á útlendska marknaðinum.